Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bjørt Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Uni Rasmussen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Um uppsagnir og setanir hjá Atlantsflogi undir og eftir koronu

Spurningar:

1. Hvussu nógv starvsfólk vórðu uppsøgd í tíðini við niðurgongd í flogferðsluni og stongsli vegna koronu? Ávikavist flogskiparar, flogternur, flogmekanikarar o.s.fr.
2. Vóru uppsagnirnar av flogskiparum og øðrum grundaðar á koronu eina og harav avleiddari niðurgongd í virkseminum hjá Atlansflogi?
3. Hvussu nógvir av uppsøgdu flogskiparunum eru settir aftur í starv hjá felagnum, og hvussu mong úr øðrum starvsbólkum? Og hvussu mong hava enn ikki fingið starv aftur hjá felagnum?
4. Hvussu nógvir flogskiparar eru settir aftur í starv við somu lønartreytum og starvsaldri, sum áðrenn uppsøgnina og hvussu nógvir eftir nýggjum og møguliga verri treytum enn teimum, sum vóru galdandi undan uppsøgnini?
5. Hvussu mong av teimum, sum ikki hava fingið starvið aftur, eru núverandi ella fyrrverandi nevndarlimir í fakfelag hjá flogskiparum ella í øðrum fakfeløgum?
6. Hvussu nógvir flogskiparar, sum ikki høvdu starv hjá Atlantsflogi innan koronukreppuna, eru nú settir í starv hjá felagnum? Og hvussu mong í øðrum starvsbólkum?
7. Ætlar felagið at bjóða øllum starvsfólkunum, herundir flogskiparum, sum vórðu uppsøgd í tíðini við niðurgongd orsakað av koronu, starv aftur í felagnum, tá virksemið er komið aftur á hædd við støðuna innan koronu?

Viðmerkingar:
Tað er sera gleðiligt, at tað nú aftur gongur væl hjá tjóðarflogfelag okkara, Atlantsflogi. Nú verður lýst eftir starvsfólki. Ógvusliga niðurgongdin í flogferðsluni orsakað av koronu rakti starvsfólkini og felagið meint, og hópin av starvsfólki vórðu søgd úr starvi. Teirra millum starvsfólk, við drúgvum royndum, sum hava verið hjartað í felagnum og verið við til at ment Atlantsflog til tað, tað er í dag.

Í desember 2020 játtaði Løgtingið at seta 100 mió. kr. í felagið til tess at bera tað ígjøgnum koronukreppuna. Undir viðgerðini varð víst á, at tá ferð aftur fór at koma á virksemið hjá felagnum, varð væntað, at uppsøgdu starvsfólkini komu aftur í starv. Spurningarnir verða settir fyri at fáa fram í hvønn mun tey nógvu starvsfólkini, teirra millum flogskiparar, ið mistu starv sítt undir koronukreppuni, hava fingið møguleikan at koma aftur í starv.

Fakfeløg eru ein týdningarmikil trygd fyri starvsfólk, og tí er avgerandi, at starvsfólk, ið eru virkin í fakfelagsarbeiði, eru væl vard. Tí verður eisini spurt um starvsfólk, sum hava verið virkin í fakfelagsarbeiði.

Á Løgtingi, 25. august 2022

Bjørt Samuelsen